Neistin-Tjaldur 47-6(22-3)

# Tjaldur fekk enn ein lússing

**Enn einaferð noyddust kvinnurnar hjá Tjaldur at leggja rygg til eitt stórtap, tá ið tær sunnudagin vóru og vitjaðu Neistan á Hálsi**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Manningin hjá Tjaldur eigur eitt stórt herðaklapp fyri, at tær so trúfastar møta upp til dyst, hóast tær ferð aftaná ferð leggja rygg til lemjandi ósigrar, har tær verða so dyggiliga úrlatnar. Soleiðis var eisini sunnudagin, tá ið steypafinalistarnir úr Neistanum tóku ímóti manningini úr Runavík.




*Tølini tala fyri seg. Tjaldurskvinnur fingu ein ordans lúsing frá Neistanum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Trý mál í hvørjum hálvleiki

Dysturin millum kvinnurnar hjá Neistanum og Tjaldur sunnudagin var samstundis eisini fyrsti dysturin hjá Inga Olsen í nýggja starvinum sum venjari hjá kvinnuliði Neistans. Ingi tók í farnu viku við eftir danan Flemming Raben, sum er farin aftur til Danmarkar.

Ikki kann sigast annað, enn at Ingi fekk eina góða byrjan í nýggja starvinum, tí havnarliðið snøgt sagt smurdi gestirnar av.

Tað var ikki óvæntað ongantíð nakar ivi um, hvagar sigurin fór, men at sigurin skuldi gerast so mikið stórur, sum hann gjørdist, var kanska eitt sindur óvæntað. Fyrstu tíggju minuttirnar var munurin ikki so øgiligur, tí tá legði Neistin seg einans á odda við trimum málum, 5-2, men so settu tær ferð á.

Innan fyri eitt tíðarskeið upp á góðar tíggju minuttir gjørdi heimaliðið ikki mætari enn at skjóta heili ellivu mál á rað, har gestirnir úr Runavík einki mál fingu, og so var Neistin bráddliga á odda heili 16-2, og dysturin var væl og virðiliga avgjørdur.

Ingi Olsen sá skjótt, at her gjørdist talan um ein lættan sigur, og hann valdi tí at skifta nógv út á liðnum hjá sær, og fleiri av teimum hjá Neistanum, sum vanliga sita nógv á beinkinum, fingu heilt fitt av spælitíð sunnudagin. Hesar stóðu seg eisini væl, og Neistin bara økti og økti um leiðsluna hjá sær, og leikararnir hjá Tjaldur vóru at kalla statistar ein stóran part av dystinum.

Risasigurin 47-6 sigur ikki so lítið um, hvussu trupult Tjaldur hevur tað í fremstu deildini, og spurningurin er, um tað ikki er drepandi fyri hondbóltsáhugan í Runavík, at kvinnuliðið soleiðis ferð aftaná ferð noyðast at leggja rygg til lemjandi ósigrar. Tær gera sítt besta, men enn er tað ikki nóg mikið til at bjóða hinum liðunum av og fáa nakað burturúr.

### Neistin-Tjaldur 47-6(22-3)

**Neistin:** Ása Dam á Neystabø 10, Unn Kragesteen 8, Simona Petersen 7(2), Marjun Tróndarson 5, Lív Sørensen 4, Mia Káradóttir 3, Annika Thomsen 3, Jórun Ludvig 3(1), Mildrið Jacobsen 2, Maria Dahl 2
**Tjaldur:** Marian Isaksen 3, Jacoba Langgaard 3
**Brotskøst:** Neistin 4(3)
**Útvísingar:** Tjaldur 2
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

---

VB-VÍF 25-24(14-14)

# Um reppið hjá VÍF

**Tað var um reppið, at kvinnurnar hjá VÍF syrgdu fyri einari minni sensatión, tá ið tær vóru í Vági sunnudagin**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Tað hevur í miðlunum verið ført fram í seinastuni, at VB er tað av oddaliðunum báðum, sum hevur verið meiri støðugt, og sum hevur verið meiri sannførandi móti liðunum, ið liggja longur niðri á stigatalvuni. Tey flestu høvdu óivað eisini vænta, at vágskvinnur fóru at vinna ein lættan sigur á VÍF sunnudagin, men so var ikki.



*Tað var um reppið, at VÍF tók stig frá VB í Vági*

*Mynd: Áki Bertholsen*

### Byrjaðu sum væntað

Í byrjanini av dystinum sá tað annars út til, at tað fór at ganga, sum tey flestu høvdu væntað, tí VB legði seg skjótt á odda, og tað gekk heldur ikki long tíð, so høvdu tær lagt se eini fýra mál fram um VÍF.

Men so gjørdi VÍF ein vørr í nakrar fáar minuttir, og tað hevði við sær, at tær heintaðu fýra mál inn aftur á VB, og tí stóð tað bráddliga á jøvnum 9-9.

Nú gekk tað rættuliga javnt á, og liðini fylgdust tað, ið eftir var av fyrra hálvleiki. VB var á odda 14-12 tveir minuttir fyri steðgin, men áðrenn hálvleikur var, høvdu vestmannakvinnurnar strítt seg upp á javnleik 14-14, sum var hálvleiksstøðan.

Eftir steðgin var tað framhaldandi rættuliga javnt, men nakað út í seinna hálvleik tóktist dysturin fáa sína avgerð, tá ið VB skeyt fimm mál á rað og legði seg á odda 23-19, og einans góðir tíggju minuttir vóru eftir at spæla. Men VÍF vildi tað øðrvísi, og tær góvu ikki skarvin yvir.

Nú tóku gestirnir yvir aftur, og nú vóru tað tær, sum fingu fimm mál á rað, og trúfastu viðhaldsfólkini hjá VB gjørdust eitt sindur óttafull um, at lokalu hetjurnar skuldu nú fara at snáva á heimavølli.

Men VB er ikki við í oddinum fyri einki, tí hóast VÌF var á odda 24-23, tá ið fýra minuttir vóru eftir at leika, so var tað heimaliðið, ið endaði omaná. Verjan hjá VB stóð sum ein múrur síðstu minuttirnar, og VÍF fekk einki mál afturat í dystinum. Í hinum endanum eydnaðist tað teimum at fáa tvinni mál, so tá ið alt kom til alt, endaði tað við einum sera teprum 25-24 sigri til VB, sum av álvara fekk ein hvøkk sunnudagin. At tær hjá VÍF hingu við høvdunum, tá ið dysturin var av, var einki at siga til, tí tær høvdu verið ómetaliga nær við at vinna ein ógvuliga óvæntaðan sigur, men gjørdust akkurát ov stuttar.

### VB-VÌF 25-24(14-14)

**VB:** Daiva Tomaite 11(5), Arnleyð Hjelm 6, Aukse Vysniaskaite 3(1), Christina Holm 3, Sólrun Krosslá 1, Rannvá Augustinussen 1
**VÍF:** Ioana Rapa 9(4), Fríða Marjunardóttir 4(1), Finngerð H. Jensen 3, Linda Johannesen 3, Nikolina Eyðbjørnsdóttir 3, Alice Høghamar 2
**Brotskøst:** VB 8(6), VÍF 6(5)
**Útvísingar:** VB 4, VÍF 5
**Dómarar:** Hannis og Uni Wardum